# Eyka bygdarráðsfundur

## Hvalbiar Kommuna

**Dagfesting:** 10.06.2020 kl. 18.30

Á fundi: Janus Thomsen
Eir J. Norðberg
Magni Bertholdsen
Niels Olaf Eyvindsson
Gunnhild Mortensen
Rúni Thomsen
Poul Laust Christiansen (fyri Sten Spange Larsen)

Skrivari: Johanna B. Djurhuus

Formaðurin bað um loyvi at taka eitt mál við aftrat, kemur á skrá sum mál nr. 2.

1. **Góðkenning av roknskapi 2019.**
Ársroknskapur hjá Hvalbiar Sóknar Kommunu fyri 2019 til góðkenningar.
Inntøkurnar frá kommunuskatti og øðrum inntøkum eru tkr. 32.162.
Rakstrarútreiðslur tkr. 27.823, rentustuðul/rentuútreiðslur tkr. 320 og løguútreiðslur tkr. 2.187 - ella íalt tkr. 30.330.
Roknskapurin gevur eitt avlop á tkr. 1.832.

| | Rakstur: | | Løgur: | |
|---|---|---|---|---|
| §1. Kommunal fyrisiting | tkr. | 2.261 | tkr. | 0 |
| §2. Almanna- og heilsumál | tkr. | 11.288 | tkr. | 0 |
| §3. Børn og ung | tkr. | 5.574 | tkr. | 0 |
| §4. Undirvísing | tkr. | 2.569 | tkr. | 119 |
| §5. Mentan og frítíð | tkr. | 1.384 | tkr. | 176 |
| §6. Teknisk mál | tkr. | 2.439 | tkr. | 512 |
| §7. Kommunal virki | tkr. | 2.308 | tkr. | 1.379 |
| | **tkr.** | **27.823** | **tkr.** | **2.187** |

Skattainntøkur vegna eldraøkið eru tkr. 8.402. Rakstrarútreiðslurnar til eldrasamstarvið eru tkr. 8.949 – leiguinntøka av sambýlinum er tkr. 362, harumframt er inngoldin restleiga fyri hálvt árið 2017 tkr. 181.

**Fíggjarnevndin 10.06.2020:**
Nevndin hevur gjøgnumgingið roknskapin og mælir bygdarráðnum til at góðkenna hann.
**Avgerð:**
Samtykt varð einmælt at góðkenna roknskapin fyri 2019.

2. **Innkomið tilboð uppá ljós og steyrar til bátahylin.**
Tilboð uppá lanternur og steyrar til bátahylin. Tilboðini eru frá kr. 153.530,00 til kr. 189.480,00, íroknað uppsetan v.m.
**Vega- og havnanevnd 10.06.2020:**
Nevndin hevur viðgjørt tilboðini og mælir til at taka av tilboðnum Bertlede steyrar Ø76 kr. 156.280,00 + eyka fyri hvítar lanternur kr. 5.446,00, íalt kr. 161.726,00.
**Fíggjarnevndin 10.06.2020:**
Nevndin hevur sama tilmæli sum Vega- og havnanevndin.
**Avgerð:**
Einmælt samtykt.

Fundarbókin lisin og skrivað undir. Fundur lokin kl. 19.30

Janus Thomsen Eir J. Norðberg Magni Bertholdsen Niels Olaf Eyvindsson

Gunnhild Mortensen Rúni Thomsen Poul Laust Christiansen